FYLGISKJAL 2

FAMILJUFYRISITINGIN undir Bryggjubakka 27 | FO-100 Tórshavn | Tel. 20 22 24 | famf@famf.fo | famf.fo

Tórshavn, tann 10. desember 2019
Málsnr. 18/00422-16

Elsa Magnussen

Sent við telduposti.

**Ummæli til uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling**

Familjufyrisitingin hevur fingið til ummælis uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling.

Familjufyrisitingin fegnast yvir, at lov om børns retsstilling verður broytt soleiðis, at pápar ikki longur skulu møta persónliga á Familjufyrisitingini at vátta faðirskapin.

Familjufyrisitingin vil vísa á, at verandi mannagongd er, at Familjufyrisitingin útfyllir oyðublaðið, og at pápin síðan møtir upp á Familjufyrisitingini at skriva undir. Familjufyrisitingin hevur sostatt ábyrgdina at tryggja at oyðublaðið er rætt fylt út eins og Familjufyrisitingin hevur ábyrgdina at tryggja, at faðirskapurin verður staðfestur. Hetta sæst aftur í § 5, stk. 1 í kunngerð um "behandling af faderskabssager mv.: "Familjufyrisitingin tryggjar, at faðirskapurin verður staðfestur."

Í sambandi við, at pápin møtir á Familjufyrisitingini at vátta faðirskapin verður pápin somuleiðis kunnaður um rættarligu fylgjurnar av at viðurkenna faðirskapin, t.e.

at pápin :

- hevur skyldu at uppihalda barninum
- kann fáa samveru við barnið
- hevur møguleika at fáa lut í foreldramyndugleikanum
- arvar barnið

og at barnið:

- kann fáa eftirnavnið hjá pápanum
- arvar pápan
- kann fáa sama ríkisborgararætt sum pápin, um treytirnar fyri tí eru loknar.

Familjufyrisitingin vil sostatt mæla til, at tað framvegis verður Familjufyrisitingin, ið hevur ábyrgdina at fylla oyðublaðið út og senda pápanum hetta til viðurkenningar saman við einari kunning um rættarligu avleiðingarnar at viðurkenna faðirskapin. Við hesi mannagongd verður tað Familjufyrisitingin, ið tryggjar at málið verður avgreitt heldur enn, at pápar av sínum eintingum skulu senda Familjufyrisitingini eina viðurkenning. Eisini verður tryggjað, at

oyðublaðið verður fylt rætt út frá byrjan, serliga við atliti til teir upplýsingar, ið skulu skrásetast í kirkjubókini og soleiðis, at møguliga óneyðugar arbeiðsgongdir verða spardar.

Vinaliga

S. Nordendal

Súsanna Nordendal
virkandi fakligur stjóri